# Leiðslan í Føroya Banka fær ikki sín vilja

**Leiðslan í Føroya Føroya Banka heldur, at skal bankin seljast, skal hann seljast allur sum hann er. Men har fer samgongan ikki at fylgjaráðunum frá bankastjóranum**

EINSKILJING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Løgmaður staðfestir at Føroya Banki verður ikki einskildur allur sum hann er. Men hvussu nógv partabørv verða seld, veit løgmaður ikki enn*

– Føroya Banki verður ikki einskildur, allur sum hann er.

Tað staðfestir Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Landsstýrið legði nakað síðani uppskot fram um at einskilja 20% av Føroya Banka.

Men samgongan læt síðani málið fella burtur og ætlanin er sostatt at taka tað framaftur í næstu tingsetu. Men, hvussu tað kemur at síggja út tá, hevur samgongan ikki gjørt sær greitt. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at tað var ikki politisk ósemja, sum gjørdi, at málið um at einskilja Føroya Banka, varð tikið aftur.

– Eftir, at málið varð lagt fram, komu nakrir upplýsingar fram, sum gjørdu, at vit hildu at tað var rættast at taka tað aftur, so at tað kundi viðgerast neyvari í samgonguni, sigur hann.

Sostatt ásannar hann, at landsstýrið hevði ikki fyrireikað málið nóg væl og at tað tí í veruleikanum ikki var búgvið at leggja fyri løgtingið. Sostatt varð tað afturtikið.

Hann sigur, at í fyrstu atløgu var tað leiðslan í Føroya Banka, sum átalaði, at Landsstýrið framdi eitt slíkt mál, uttan at leiðsla og nevnd bankans vóru hoyrd, samstundis sum at Fíggingargrunnurin, sum eigur bankan, heldur ikki varð eftirspurdur.

– Samtundis fanst bankaleiðslan at, at uppleggið sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum brúkti sum grundarlag fyri einskiljingina var ov gamalt, og at fortreytirnar vóru rættiliga nógvbroyttar, síðani tað varð gjørt.

Jóannes Eidesgard sigur, at harafturat stungu nakrir tekniskir trupulleikar seg upp, eftir at málið varð lagt fram.

– Eftir at málið varð lagt fyri tingið, kom fram, at skulu partabrøvini verða skrásett á virðisbrævamarknaðinum, krevst, at minst 25% av Føroya Banka verður einskildur.

– Verða bara 20% av partabrøvunum í Føroya Banka seld, koma tey bara á skrásetta marknaðin og ikki á virðisbrævamarknaðin.

Løgmaður er ikki heilt greiður yvir, hvønn týdning hetta hevur í veruleikanum, men hann sigur, men landsstýrið vil eisini kanna hendan spurningin nærri.

Og so kom tað eisini fram, at landsstýrið hevði møguliga gjørt ein tekniskt mistak við tað, at málið varð lagt fram sum eitt uppskot til samtyktar.

– Fyrr var tað so, at skuldi landsins ognir seljast, skuldi tað altíð vera talan um eina lógarheimild. Sostatt er tað komið fram, at helst verður neyðugt at leggja uppskotið um at einskilja Føroya Banka fram sum eitt lógaruppskot og ikki sum eitt uppskot til samtyktar.

Løgmaður sigur, at øll hesi viðurskifti gjørdi, at landsstýrið metti at tað var rætt at lata málið fella burtur hesuferð.

– Sostatt fáa vit høvið til at kanna tað nærri og at fyrireika tað betri til í heyst, tá ið tað so verður lagt fram aftur, sigur hann

## Ikki seldur 100%

Men so var tað eisini leiðslan í Føroya Banka sum vísti á, at tað var óheppið, at landsstýrið kunngjørdi at bara 20 % av bankanum skuldi seljast. Bankaleiðslan helt avgjørt, at skal bankin seljast, skal hann seljast allur sum hann er fyri at fáa sum mest burturúr.

– Tað er rætt at bankaleiðslan heldur tað. Men hetta er ein spurningur, sum verður avgjørdur í samgonguni. Og samgongan fer nú at taka støðu til, hvussu stórur partur av bankanum skal einskiljast. Tað verður ein politisk telving í samgonguni, sum kemur at avgera tann spurningin.

– Men har vænti eg ikki, at leiðslan í Føroya Banka fær sín vilja, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað vil siga, at Føroya Banki verður ikki einskildur, allur sum hann er?

– Nei, tað verður hann ikki, staðfestir løgmaður.

Hann sigur, at tað er ongin loyna, at av samgonguflokkunum er tað javnaðarflokkurin, sum er mest ivingarsamur um at einskilja Føroya Banka.

– Í Javnaðarflokkinum havi eg gjørt meg til talsmann fyri, at einskiljing skal ikki vera eitt tabu-evni í flokkinum, tí einskiljing er eitt rák, sum er frammi í tíðini. Og taka vit lut í tí viðgerðini, fáa vit í hvussu so er ávirkan á tey tiltøk, sum verða framd á hesum øki.

– Men vit skulu heldur ikki einskilja, bara fyri at einskilja. Tað skulu verða skilagóðar orsøkir fyri at einskilja. Og eru nakrir fyrimunir við at einskilja, so er rætt at gera tað. Men í hesum sambandi meinar hann eisini við fyrimunir fyri borgaran.

– Spurningurin um einskiljing skal viðgerast frá málið til mál, men tað skal ikki einskiljast fyrilitarleyst, bara fyri at einskilja, tí tað er onki endamál í sær sjálvum.

Men hvussu stórur partur av Føroya Banka verður einskildur, hevur løgmaður onki boð uppá enn.

# Smáir útróðrarbátar loyvi at fiska frítt

**Samgongan er samd um at tað skal vera fríari hjá smáum útróðrarbátum at fiska**

ÚTRÓÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú erú útlit fyri einum lættari gerandisdegi hjá teimum, sum eiga smáar útróðrarbátar. Samstundis eru útlit fyri, at tað fer at vera munandi lættari at umsita fiskiloyvini hjá teimum smáu útróðrarbátunum.

Tey, sum umsita fiskivinnulógina, brúka sera nógva orku upp á at umsita fiskiloyvi til teir smáu bátarnar.

Eitt er at útskriva loyvi til allar bátarnar tvær ferðir um árið, men eitt annað er at skráseta allar fiskidagarnar fyri at telja fiskidagarnar hjá teimum, soleiðis at fiskiskapurin kann steðgast, tá ið fiskidagarnir eru uppi.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at samgongan hevur avtalað at gera tað lættari hjá teimum smáu bátunum.

Og tað arbeiðið er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, farin í holt við.

Hann sigur, at endamálið við tí er, at teir smáu bátarnir skulu takast heilt burturúr fiskidagaskipanini, so at teir kunnu fiska frítt.

Men hann veit ikki, hvar markið kemur at ganga.

– Viðgerðin í samgonguni kemur so at vísa, hvussu smáir bátarnir skulu vera, fyri at teir kunnu fáa loyvi til at fiska frítt, sigur løgmaður.



*Smáir útróðrarbátar skulu takast úr fiskidagaskipanini, so at teir kunnu fiska frítt*
*Tilvildarlig mynd*



**Sunnudagur á Rio Bravo frá kl.11.30**

Serstøk Menu

**Rómatilgjørd aspargessuppa**
**- tann hjá prinsinum**

**Colorado Steak**
**afturvið: bakað epli, reyðvínssós ella bernaisesós**

**Pannukøkur**
**við heimagjørdum ísi**

3 rættir 165,-
2 rættir 135,-
Børn ½ prís

RIO BRAVO RESTAURANT

RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67

· Beef & Steak House ·

team85

**Rørir tað teg?**

**Evangelisk møtirøð við Robert Bwalya**

**29.mai - 04.juni**

Leygardag 29.05……...........kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnudag 30.05...........kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05…….kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hvítusunnukvøld 30.05…….kl.22.00
***Lovsangskvøld***

2.Hvítusunnudag 31.05.......kl.11.00
*Robert Bwalya talar*

2.Hvítusunnukvøld 31.05....kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Týsdag 01.06…………….kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Mikudag 02.06…………..kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Hósdag 03.06…………….kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

Fríggjadag 04.06…………kl.19.00
*Robert Bwalya talar*

**Øll møtini verða hildin í Filadelfia, Landavegur 22.**

**Les meir á www.filadelfia.fo**

Filadelfia - Landavegur 22 - tel: 314828
email: filadelf@post.olivant.fo - www.filadelfia.fo



**Styrket Totaløkonomi**
**- økt Konkurransekraft**

**FloodRocks har det siste året kjørt workshops innen økt effektivisering og nyskapning for Færøyske organisasjoner. Evalueringene har vært svært gode.**

I juni inviterer vi bedrifter og offentlig forvaltning til Åpne kurser:

**Workshops for økt nyskapning**
Varighet: 3 deler a 5 timer
Tider: Serie 1: 2, 3 og 4. juni. Serie 2: 7, 8 og 9. juni
Kursserien lærer deltakerne hvordan de skal lage effektive nyskapningsgrupper. En bedrift i Norge hadde en gevinst på mer enn 60 ganger investeringen i Floodrocks workshops.

**Salgstreningsprosess**, basert på forskning blant de mest konkurransedyktige organisasjoner.
Varighet: 4 deler a 3 dager
Tider: Del I: 10-12. juni, del II: 25-27. aug. del III: 22-24. sept. Og del IV: 24-26.nov.

Deltakerne blir dyktiggjort i Eliteselgerorganisasjonens psykologi og arbeidsmåte under følgende faser:

1. **Førstegangskontakten,** hvor interessen for selgers produkt skapes.
2. **Klargjøringsfasen,** hvor grunnlaget for tilbud avsluttende fase legges.
3. **Den Avsluttende fase,** hvor selger presenterer sitt tilbud overfor beslutningstaker.
4. **Den Strategiske fase,** hvor selger skal tilpasse sitt produkt til kundens mål og strategi.
5. **Forhandlingsfasen,** hvor selger får ordren uten å måtte gi bort nødvendig inntjening

Prosessen avsluttes med C-eksamen, hvor den enkelte deltaker møter en simulert kundesituasjon med høy vanskelighet, hentet fra deltakers virkelighet. Eksamen bedømmes av en relevant jury på 3 medlemmer.

Eliteselgerorganisasjonen selger opp til fem ganger snittselgers resultat.

Kursleder er Morten Selven, som var prosjektleder for Eliteselgerundersøkelsen. C-Prosessen er meget godt tilrettelagt for salg mot det internasjonale marked. Be om referanser.

**Vennligst kontakt Kunderåd-giver Kaj Magnus Klein på +47 62579117, mob 522295 eller +47 90924241**



**Adm dir for Timberjack Norway AS, Håvard Brynjulvsrud:**
"FloodRocks har gitt organisasjonen en viktig plattform som man kan bygge videre på". Mulighetene til kostnadsforbedringer er åpenbare". Timberjack er verdens største leverandør av skogs-maskiner.



**Adm leder for Den Sosialpedagogiske Høgskolen i Sandnes, Synøve Faldalen:**
"Prosessen vil ha en stor nytteverdi for alle som har behov for å kunne legge frem komplekse budskap på en god og forståelig måte, samt behandle kompliserte motforestillinger. C-Prosessen er derfor svært godt egnet for et gradsopplegg, primært som Yrkesrettet master. Her er det en stor fordel at C-prosessen allerede er godkjent som utdannelse på høyere nivå".

FloodRocks
*Lave kursinvesteringer - stort utbytte*

Sosialurin 341800